DAGSINS MEINING

Greið útmelding um ES

Tað var í tøkum tíma, at løgmaður meldaði út við støðu landsstýrisins til nýggju ES grundlógina og fylgjurnar fyri Føroyar av tí umskipan, ið er á veg í Europa. Lat fara at løgmaður samstundis kom at avdúka, at undanfarna samgonga hevur sovið í tímanum. Lat so fara at hendan samgongan var líka við at liggja sjóvarfallið av sær. Landsstýrið fer at skjóta upp at settur verður ein føroyskur - danskur bólkur við serfrøðingum at endavenda øllum teimum spurningum og ivamálum, sum standast av, at Danmark møguliga fer at taka undir við ES grundlógini.

Eingin ivi kann vera um, at tað er av størsta týdningi at fáa staðfest og útgreinað, hvørjar ítøkiligar avleiðingar ES grundlógin fær fyri Føroyar. Talan er sum kunnugt um fýra høvuðsøki, nevniliga uttanríkismál, verjumál, rættarpolitikkur og gjaldoyrapolitikkur. Vera hesi øki flutt úr Keypmannahavn til Bruxelles, so slepst ikki undan, at hetta fær fylgjur fyri ríkisfelagsskapin so ella so. Tað er tí sera umráðandi, at allar fylgjur av broytingunum verða útgreinaðar út í æsur. Tað er tí eins umráðandi, at tað veruliga vera serfrøðingar og ikki hálvir politikkarar, sum skulu gera útgreiningararbeiðið. Her má eingin krógvað dagsskrá vera.

Løgmaður nevndi í útvarpinum í gjár møguleikan at samstarva við Grønland um hetta mál. Hetta er upplagt, og eigur so avgjørt at verða roynt. Tað er tí eitt sera gott hugskot, at løgmaður tekur hesar spurningar upp á komandi ríkisfundi. Eisini umrøddi løgmaður framtíðarstøðuna, um Danmark fer undir ES grundlóg. Hann vísti á, at einki er, sum forðar Føroyum og Grønlandi at átaka sær tey øki, sum í dag eru felagsmál, men sum verða flutt yvir til ES við grundlógini. Hetta er áhugavert, og eigur serfrøðingabólkurin at umhugsa hesa síðuna av málinum eisini ella við øðrum orðum, hvussu loysa vit best hesar uppgávur og hvussu kunnu Føroyar og Grønland í felag loysa nakrar av hesum uppgávum. At enda skulu vit loyva okkum at minna á, at tað er sera umráðandi, at serfrøðingabólkurin undir arbeiði sínum hevur samband við teir partar av samfelagnum, sum viðkomandi øki fevna um. Tað má ikki enda sum við Hvítubók - nógvur roykur men eingin grind!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Viðmerking til Óla Heinesen og tíðindini um innkrevjing av mvg-eftirstøðu

Petur Martin Petersen
Mogensgade 13, 1.tv.,
8500 Grenaa

Varð eitt sindur skakkur av at hoyra Óla Heinesen, stjóra á Toll- og Skattstovuni, úttala seg í útvarpstíðindunum um innkrevj-ingina av mvg-eftirstøðu.

At geva eini manglandi lóggávu, at taka vinnuloyvi frá handilsfólki, skylduna fyri manglandi innkrevjing av mvg-eftirstøðu, haldi eg verða langt úti.

Óli var inni á, at tað ikki loysti seg at koyra fyritøkur á húsagang, men hvat meinar Óli tá við, at tað ikki loysir seg. Toll- og Skattstovan hevur skyldu til at koyra eina fyritøku á húsagang, um tað vísir seg, at fyritøkan ikki klárar at halda sínu figgjarligu skyldur. Minst til Óli, at Toll- og Skattstovan hevur skyldug til at avmarkað tapi hjá Landskassanum, og hvussu kanst tú avmarka eitt tap, tá ið tú letur fyritøkuna halda fram og harvið økja um mvg-eftirstøðuna til landskassan.

Minkar Toll- og Skattstovan tapsvandan við at taka vinnuloyvi frá fyritøkum, tá ið tað ikki loysir seg at koyra fyritøkur á húsagang? Her er okkurt sum mótsigur sær sjálvum. Óli Heinesen veit væl, at nógvar av fyritøkunum, sum skylda mvg til landskassan, hava havt stráðmenn aftan fyri seg. Tað verða ikki minni strámenn, um Toll- og Skattstovan fær loyvi til at taka vinnuloyvi frá fyritøkum.

Síðani nevndi Óli Heinesen nakað um, at fyritøkur ikki lata sína mvg uppgerð inn. Og her kann eg skoyta uppí, at tað eru vinnurekandi í Føroyum, sum ongantíð síðani 1993 hava latið eina tí einastu mvg uppgerð inn síðani mvg kom í gildid í Føroyum. Kanska var tað uppá sítt pláss hjá Toll- og Skattstovuni at fáa hesar uppgerðirnar inn. Mær vitandi hevur Toll- og Skattstovan 10 tals fólk í starvi, sum hava til uppgávu at hava eftirlit við fyritøkum. Men her hevur so okkurt haltað í ólukkumát. Fyri at tað ikki skal verða lygn, so er sama skili galdandi, tá ið talan er um at lata sjálvuppgávur/rokniskapir inn til Toll- og Skattstovuna. Toll- og Skattstovan heldur seg hava uppfunnið eina skipan, sum ikki finst aðrastaðni í verðini; at lata eina teldu áseta hvussu nógv mvg og hvussu nógvan skatt tú skalt gjalda. Ja tú hevur lisið rætt, eina teldu.

Hendan góða teldan gevur so aftur boð til innkrevjingarfólkini, at hon (teldan) metir at innkrevjingarfólkini skulu krevja so og so nógv mvg og so og so nógvan skatt frá fyritøkuni ella persóninum.

Fyri at Føroya fólk ikki skal halda at pantifútarnir á Toll- og Skattstovuni einki gera til nyttu, skal eg boða frá, at nógvir av pantifútunum als ikki hava pantifútarbeiði sum sína primeru uppgávu. Pantifútin er, tíverri, nógv meira málsviðgeri enn hann er pantifúti. Eitt stórt afturstig fyri innkrevjingina í Føroyum, tí at tað verðuliga eru brúk fyri pantifútum burturav, sum dag og dagliga eru í markini fyri at tryggja landskassanum, at eftirstøður koma inn.

Hetta er ikki meint sum niðurgerðan av pantifútanum, men hann hevur ikki annað val, soleiðis sum arbeiðsbýti á Toll- og Skattstovuni er ídag. Trúgv mær Óli, at tá ið pantifútin fær loyvi til at virka sum pantifúti burtuav, so skalt tú síggja, at mvg-eftirstøðan til Landskassan koma niður á tær 20 mill. tú tosar um. Men hettar krevur eisini nakað av eftirlitsfólkunum á Toll- og Skattstovuni, sum mugu ganga hond í hond við pantifútanum, tá ið slagið um innkrevjing skal standa sína roynd.

Føroyar eitt valdømi?

Finnleif Guttesen

Fyri tingmenninar valdir í Suðuroy, hevði hetta ikki verið nakar trupulleiki, tvørtur ímóti, tí teir hugsa bert um eitt, seg sjálvan.

Nei, har manglar dirvi til at halda orð, sjálvt um tað hevur keðiligar politiskar avleiðingar, og dirvi og ryggur til at seta treytir, sum eru til gagns fyri teirra veljarar

Hesin veruleiki hevur verið sera sjónligur síðani kreppuna fyrst í nítiárunum, tí, til hvørt val hava teir lovað bæði eitt og annað, fyri at økja um arbeiðspláss í Suðuroynni, men tað einasta, ið er hent, er, at arbeiðspláss hvørva og fólkatalið minkar.

Nýggj ferja, kei og tunlar

skapa einki varandi arbeiðspláss, tað veit einhvør suðringur, men tað er ivasamt, um teir fólkavaldu tingmenninir í Suðuroy eru greiðir um hendan veruleika - tí tað einasta, sum teir brúka orðaskvaldur uppá, er ferja,kei og tunnil. So, Føroyar eitt valdømi, hevði passað hesum tingmonnum serstakliga væl, tí so sluppu teir frá at lova sínum veljarum nakað, sum teir allíkavæl ikki halda.

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Verður føroyska samfelagið betri við einum valdømi?

Jógvan við Keldu
landsstýrismaður

Bert eitt land uttanum okkum hevur eitt valdømi, tað er Grønland, og har er lagt upp til broytingar, m.a. tí at umboðaniner so mikið órættvís.

Av og á kemur upp at venda, at betri og meira rættvíst hevði verið, um Føroyar var eitt valdømi, heldur enn sum nú - sambært verandi lóg - sjey valdømi, har talið á tinglimum í hvørjum øki sær er ásett, og síðani er umframt møguleiki fyri, at upp til fimm limir kunnu verða eykavaldir eftir §§ 32 og 33.

Á ferðini í Grønlandi, hevur løgtingsformaðurin helst tosað við onkran politikara, sum er fegin um, at Grønland er vorðið eitt valdømi. Við hesum kemur hann heim og vísir á, er ætlan samgongunnar er at endurskoða løgtingsvallógina, har nakrar broytingar skulu fremjast, og tá kann talan verða um eitt valdømi, sum hann sigur har "eru fyrimunirnir nógv fleiri enn vansarnir".

Løgtingsvallógin verður nú endurskoðað
Fólk í Innlendismálaráðnum hevur so smátt sett skjøtil á hesa endurskoðan, eitt arbeiði sum kemur at verða framt í komandi mánaðum.

Lat meg beinanvegin siga, at bæði Grønland og

Ísland hava broytt sínar vallógir soleiðis, at Grønland er eitt valdømi, og Ísland er býtt upp í seks valdømi.

Føroyska vallógin eins og danska hevur til endamáls, at umframt at miðøkini skulu hava sína umboðan, skal eisini verða sæð til, at økini eisini verða umboðað í løgtinginum og í danska fólkatinginum.

Í Grønlandi búgva í dag 23 tingfólk av 31 í høvuðsstaðnum Nuuk. Suðurgrønland hevur einki umboð, Eysturgrønland eitt umboð. - Sambært uppskotinum um nýggju sjálvstýrislógina í Grønlandi er talan um at gera broytingar í vallógini aftur, tí hon virkar ikki nóg væl.

Neyvan meiriluti fyri einum valdømi í løtuni
Bæði Útvarp Føroya og Dimmalætting - her kann vísast til oddagrein - hava gjørt eitt ávíst arbeiði við at "sláa eitt slag" fyri einum valdømi, meðan Sjónvarp Føroya fekk burtur úr prátinum við Fólkaflokkin, at Fólkaflokkurin ikki hevur viðgjørt málið, men at har er ivasamt, og ein av tíðindamonnum útvarpsins fekk sagt, at "Fólkaflokkurin er jaligur", sum hann tók til.

Formaður Fólkafloksins Anfinn Kallsberg hevur greiðliga sagt, at tíðin er ikki búgvin fyri kjakinum um eitt valdømi, tí nógv skal fáast upp á pláss áðrenn, eitt nú, hvat kommununrar skulu umsita og hvussu økini í framtíðini skulu síggja út.

Ísland
Venda vit síðani aftur til Ísland, er Reykjavíkarøkið býtt upp í tvey, meðan hini fýra av seks økjunum fevna um 10 tinglimir hvørt. Eysturlandið hevur helst longu mist ein tinglim, so har eru bert 9 tinglimir. - Íslendingar eru sera ivasamir, og vit skulu minnast til, at næstan helmingurin av øllum íslendingum býr um Reykjavíkarleiðina.

Sentralistar og fjølmiðlar
Eingin ivi er um, at sentralistar eru samdir um eitt valdømi.Tá fáa vit helst somu viðurskifti við búseting og býti av ting-mannatalinum sum í Grønlandi. Aðrir tinglimir, sum búgva úti um landið, eru ivasamir um rætt er við einum valdømi.

Tað tykist eingin ivi hjá báðum nevndu fjølmiðlunum, Útvarpi Føroya og Dimmalætting, at teir ynskja eitt valdømi, so - sum Dimmalætting tekur til í oddagreinini - at sleppast kann undan lokalpolitikki í framtíðini. - Ber til hjá landsfevndum fjølmiðli at vera so blindur og so subjektivur?!

Í hesum sambandi eigur spurningurin at verða umhugsaður um framhaldandi at varðveita Føroyar sum eitt fjølbroytt og samansett land, har givið verður ymisku økjunum kring landið ans, og tey hava ávirkan, og eisini eru búskaparliga gevandi til alt landið.

Fáast í rættlag við nøkrum tekniskum broytingum
Sum er ber til at tryggja, at ymisku landafrøðiligu økini fáa umboðan á tingi. Ein skipan við einum valdømi tekur sum kunnugt ikki hædd fyri hesum.

Rættvísin við einum valdømi er sera ivasom á fleiri økjum. So kunnu vit spyrja, um allar Føroyar verða betri við einum valdømi, og um neyðugt er at taka grundleggjandi súlurnar undan okkara skipan, heldur enn at fáa rættað teir teknisku skeivleikarnar,ið eru.

Við teimum grundgevingum, sum higartil eru komnar, er eingin orsøk til at gera Føroyar til eitt valdømi, tí eitt heldur rættvísari býti kann fáast við m.a. fleiri eykatingvaldum og við smávegis broyt-ingum í nýttu roknihættunum, soleiðis at tingmannabýtið samsvarar við prosentvísa býtið av atkvøðunum.

Fría kappingin – marknaðarkreftirnar ráða ?? – Flogferðslan eftirbátur

Johan Dahl
løgtingsmaður

Vit eru altíð sera avgjørd, tá tað um fiskivinnuna á sjógvi og landi snýr seg, at tosa um kappingarfrið, marknaðarkreftir og fría kapping og onki ilt at siga um tað, MEN, hví tosa vit ikki um tað sama, tá tað hevur við loftferðslu at gera?

Hyggja vit kring okkum um allan heim so er tað eftirhondini so bíligt at seta seg í eitt flogfar, at ein næstan fær pening goldnan afturfyri.

Dømi um ferðakostnaðir
Eg kann her geva nøkur fá dømi um prísstøði og viðmerkjast skal, at flestu av hesum flogleiðum hava somu flúgvitíð sum Keypmannahavn - Føroyar, tó er

50 min longri at flúgva til Keflavíkar.

Keypmannahavn - Keflavík	uml. 860 kr. hvønn vegin
Keypmannahavn - London	uml. 495 kr. hvønn vegin
Keypmannahavn- Amsterdam	uml. 395 kr. hvønn vegin
Keypmannahavn - Brussel	uml. 325 kr. hvønn vegin
Keypmannahavn - St. Petersburg	uml. 825 kr. hvønn vegin

Tann fría kappingin?
Á Føroyaleiðini hava vit eina meir ella minni kartell-líknandi monopolstøðu, har flogfeløgini, sum hava konssesiónina, avtala sínámillum prislegu, sum síðani verður góðkend av vinnumálaráðnum.

Er hetta ikki við at verða ein farin tíð?

Hví ikki geva øllum ferðandi til og úr Føroyum sama møguleikan at ferðast bíliga til á sama hátt sum restin av heiminum ger tað og latað fríu kappingina ráða?

Hvat er tað fyri "serstøða", sum vit eru í, tá vit skulu gjalda fleirfalt tað sum onnur ferðandi gjalda fyri stórt sað somu flúgviteinar í londunum rundanum okkum ?

Tá ið marknaðarkreftirnar ikki fáa loyvi at virka, - hvar er tá tann fría kappingin kann ein spyrja?

Kartellavtalur og bøtir
Hyggja vit t.d. at, hvat hendi viðv. avtalaðum prísum millum SAS og Mærsk Air á ávísum leiðum í Europa fyri nøkrum árum síðani, so fingu hesi bæði feløg stórar bøtur frá ES - minnist meg rætt so vóru tær í fleiri 100 milióna krónurs klassanum, fyri at hava gjørt slíkar ólógligar avtalur, ið høvdu við sær, at marknaðarkrefturnar vórðu settar út av spælinum fyri egnan vinnning skuld.

Hjá okkum er hetta eyðsýnt í finasta lagi ??

Tað er í lagið at avtala prísir millum flogfeløgini!

Vóru vit ein partur av ES, høvdu vit ivaleyst fingið aðra bók í at lisið hesum viðvíkjandi.

Kappingar- og ánaraviðurskiftini mugu normaliserast
Tað eigur at verða gjørt nakað ítøkiligt fyri at normalisera kappingarviðurskiftini á Føroyaleiðini og mugu vit tí gera app við okkum sjálvi, um vit vilja hava eitt/tvey - av ferðafólkunum subsidieraði flogfeløg (eg sigi subsidierað tí vit gjalda ein yvirprís fyri hvønn einasta ferðaseðil) í mong ár framyvir, ella vilja vit hava eitt/tvey flogfeløg sum kappast á jøvnum føti framyvir?

Okkara egna almenna flogfelag eigur at standa á egnum beinum og blíva einskilt í nærmastu framtíð.

Politiskt eigur hetta mál at verða tikið upp í komandi tingsetu.

Hvat er hetta fyri nakað?

Gunnleivur Dalsgarð
Formaður í Starvsmannafelagnum

VIÐMERKING TIL ÓLA HEINESEN, STJÓRA Á TOLL- OG SKATTSTOVU FØROYA:

Tað eru ikki smávegis tíðindir, ið stjórin á Toll- og skattstovu Føroya, Óli Heinesen, kemur við um eftirstøður av 10tals milliónum í MVG og manglandi innkrevjingarmøguleika og - vilja at fáa hendan útistandandi pening í kassan.

Men innkrevjingini hevur fyri nøkrum árum síðani eisini verið á breddanum og tað skortaði ikki uppá ávaringar um at hetta fór at verða gongdin, men leiðslan valdi heldur enn at menna og útbyggja innkrevjingina, at senda starvsfólk til hús og mestsum avmontera deildina tá, í eini meinings- og viljaleysari herferð, sum fyrst og fremst hevði til endamáls, at verja eina leiðslu og fáa eina leiðslukabalu at ganga upp. Starvsfólk og deild vórðu offraði í hesum ódámliga "spæli"!

At innkrevjingini hevur havt og hevur dugnalig starvsfólk, er ongin ivi um, so tað er ikki har trupuleikin skal vendast ímóti.

Mín spurningur til Óla Heinesen og Fíggjarmálaráðið er tí fyrst og fremst:

Hví var so umráðandi fyri nøkrum árum síðani at fara undir eina herferð, at syndra eina vælvirkandi innkrevjing og senda fólk til hús, vælvitandi um at her var ovmikið at tríva í og fáa uppá pláss, við innkrevjingarfólkum, sum vistu og dugdu sítt arbeiði til fullnar?

Løgið um ikki onkur, helst fleiri í ovastu leisluni á Toll- og Skatt og Fíggjarmálaráðnum, nú eiga at hava ringan smakk í munninum, um tað herferð, sum tá varð víst móti deildini og ikki minnst starsvfólkunum!

Nú at fáa at vita, at allar hesar milliónirnar "standa úti", er beinleiðis skakandi. Vit brúkarar av tænastunum hava goldið hesum fyritøkum í dýrum dómum hetta sama MVGið. At tað skal bera til, at fyritøkur kunnu "leggjast á" hendan pening, uttan at hetta fær fylgir fyri tær frá myndugleikunum, sum vara av, at lógir og reglur verða hildnar, er ófatuligt og kann als ikki góðtakast.

Tað minnsta kravið, frá okkum sum borgarar og sum hava goldið hesum fyritøkum meirvirðisgjaldið, er, at vit fáa at vita hvørjar hesar fyritøkur eru, sum ikki halda sínar skyldur mótvegis landskassanum, soleiðis at vit fáa møguleika, at sálda tær frá, tá vit hava brúk fyri at keypa okkum eina tænastu ella vøru. Men høvuðskravið er tó sjálvsagt, at myndugleikarnir skipa so fyri og nýta ta neyðuga orkuna, sum skal til, fyri at hetta kann steðgast og ikki sleppur at halda fram. So stuttligt er tað nú ikki at gjalda MVGið, at vit hava hug at gjalda hetta tvær ferðir!

Her er nógv at tríva í, hjá teimum, sum hava leiðsluna í hesi landi!